LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. desember 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/18452-28
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv til Heilsumálaráðið um klagu frá KVF um vantandi innlit í eina átalu og grundarlagið fyri átaluni**

Tann 14. september 2023 móttók eg tvær klagur frá KVF um Heilsumálaráðið.

<u>Klaga 1</u> var um drál við at veita innlit í fundarfrásøgn frá fundi tann 16. juni 2023 millum landsstýriskvinnuna og sjúkrahússtjórarnar. Tann 28. juni 2023 bað KVF um innlit í dagsskránna og frágreiðingina frá fundinum 16. juni 2023. Sama dag gav Heilsumálaráðið innlit í dagsskránna, men noktaði innlit í frágreiðingina. Grundgevingin var, at frágreiðingin ikki var endaliga góðkend av luttakarunum og tí var at meta sum eitt innanhýsis skjal, sbrt. § 7, stk. 1 nr. 1 í innlitslógini.
Vísandi til at Heilsumálaráðið hevði svarað hesi innlitsumbønini, avvísti eg hesa klaguna. Eg mælti samstundis KVF til at senda nýggja umbøn um innlit í ynskta skjalið.
KVF vendi sær aftur til mín um málið, tí KVF metti, at vandi var fyri at myndugleikar við fyrimynd í hesum máli nú fóru at "sylta" skjøl við tí grundgeving, at tey ikki vóru endaliga góðkend, og harvið sleppa sær undan at veita innlit, meðan málið enn var aktuelt fyri tíðindaflutningin. Við støði í hesum avgjørdi eg at viðgera klaguna um innlit í fundarfrágreiðingina saman við klagu 2.

<u>Klaga 2</u> var um vantandi svar frá Heilsumálaráðnum til eina innlitsumbøn frá 29. juni 2023, sum var soljóðandi:

> "Við hesum verður biðið um innlit í ta átalu, ið A fekk á fundi í Heilsumálaráðnum tann 16. juni í ár. Somuleiðis verður biðið um innlit í grundarlagið fyri hesi átalu."

**Málsupplýsingin**
Tann 14. september 2023 bað eg Heilsumálaráðið um frágreiðing og skjølini í málinum.

Tann 21. september 2023 svaraði Heilsumálaráðið:

> "...
> Sum sæst av hjáløgdu skjølum, hevur ... KVF *(mín viðm)* biðið um innlit 29. juni 2023. Tann 4. juli 2023 sendi Heilsumálaráðið svarskriv til ... KVF *(mín viðm)* Í svarskrivinum

> verður boðað frá, at ongin átala varð givin á fundinum 16. juni 2023 og at fundarfrásøgnin ikki er endaliga góðkend. Tí varð innlit ikki latið í málið.
>
> Sostatt er innlitsumbønin svarað 5 dagar eftir, at hon er móttikin. "

Svarskrivið frá Heilsumálaráðnum til KVF var soljóðandi:

> "Víst verður til umbøn tína um eina átalu, sum A skal hava fingið á fundinum 16. juni 2023.
> Sagt verður frá, at ongin átala er givin á fundinum tann 16. juni.
> Tú hevur eisini biðið um innlit í frásøgnina frá áðurnevnda fundi. Sagt verður frá, at frásøgnin enn ikki er endaliga góðkend."

Tann 22. september 2023 vendi eg mær aftur Heilsumálaráðið og bað ráðið greiða frá, nær fundarfrágreiðingin var endaliga góðkend, og um ráðið hevði umhugsað at viðgjørt umbønina frá KVF umaftur, tá frágreiðingin var liðug.

Tann 28. september 2023 svaraði Heilsumálaráðið, at KVF hevði sent nýggja innlitsumbøn 18. september 2023, og at ráðið tann 21. september 2023 gav KVF innlit í endaligu frásøgnina frá fundinum 16. juni 2023. Avrit av frágreiðingini frá fundinum 16. juni 2023 var hjálagt og vísti, at endaliga frágreiðingin var dagfest 5. september 2023.

Tann 3. oktober 2023 bað eg Heilsumálaráðið greiða frá málsviðgerðini av fundarfrágreiðingini frá 16. juni til 5. september 2023 herundir, hvør orsøkin var til, at frágreiðingin ikki var endaliga góðkend fyrrenn 5. september 2023. Biðið varð eisini um skjølini viðvíkjandi hesi málsviðgerð.

Tann 23. oktober 2023 svaraði Heilsumálaráðið, at av tí at fólk høvdu verið í feriu, og at tað høvdu verið ymiskar fatanir av, hvat var ítøkiliga sagt á fundinum, hevði tað seinkað tilgongdini soleiðis, at endaliga frásøgnin var send út 5. september 2023. Skjalayvirlit og ávís skjøl úr máli nevnt "menningarfundir millum sjúkrahússtjórarnar og Heilsumálaráðið" var viðsent.

Tann 30. oktober 2023 vendi eg mær aftur til Heilsumálaráðið. Eg vísti til, at skjal 14 í málinum vísti, at mál um álit í leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum, sum hevði verið umrøtt á fundinum 16. juni 2023, ikki var nevnt í fundarfrágreiðingini. Eg spurdi, hví hesi viðurskifti ikki vórðu umrødd í fundarfrágreiðingini og um frágreiðing / notat annars var gjørt frá hesum parti av fundinum tann 16. juni 2023. Eisini bað eg um at fáa avrit av møguligum skjølum.

Tann 8. november 2023 móttók eg frágreiðing frá Heilsumálaráðnum. Ráðið greiddi frá, at menningarfundurin 16. juni 2023 hevði fasta dagsskrá. Áðrenn fundurin byrjaði, ynskti landsstýriskvinnan at tosa við sjúkrahúsleiðsluna um samstarv og álit í sambandi við eitt starvsfólkamál, ið var avgreitt. Eftir innleiðandi prátið varð farið undir skránna fyri

menningarfundin. Ein av sjúkrahússtjórunum ynskti, at kunningin um starvsfólkamálið kom við í fundarfrágreiðingina. Hann hevði tí gjørt ískoytið til fundarfrágreiðingina um hesi viðurskifti. Frá Heilsumálaráðnum var tó mett, at ískoytið frá stjóranum ikki var partur av menningarfundinum, men skuldi skrásetast í starvsfólkamálið.

Tann 10. november 2023 spurdi eg Heilsumálaráðið, um somu fundarluttakarar vóru tilstaðar undir kunningini frá landsstýriskvinnuni um ávísa starvsfólkamálið sum á menningarfundinum, og um Heilsumálaráðið gjørdi frágreiðing / notat frá kunningini. Um ikki, so varð ráðið biðið um at greiða frá grundini fyri hesum. Samstundis bað eg um at fáa skjalayvirlit og ávíst skjal úr starvsfólkamálinum, ið talan var um.

Tann 16. november 2023 svaraði Heilsumálaráðið, at somu persónar, sum luttóku á menningarfundinum, vóru eisini til staðar áðrenn fundin, tá landsstýriskvinnan kunnaði um starvsfólkamálið. Ráðið segði, at tað hevði ikki gjørt frágreiðing ella notat frá hesi kunning. Sum grundgeving varð víst til § 6, stk. 1 í innlitslógini. Umbidna skjalayvirlitið úr starvsfólkamálinum og umbidna skjalið vórðu send við.

Tann 17. november 2023 bað eg Heilsumálaráðið send mær fleiri skjøl úr starvsfólkamálinum. Hesi móttók eg tann 21. november 2023.

## Niðurstøða

Í sambandi við upplýsing av málinum havi eg sæð samskiftið millum Heilsumálaráðið og fundarluttakararnar um frágreiðingina frá menningarfundinum 16. juni 2023 í Heilsumálaráðnum millum sjúkrahússtjórarnar og Heilsumálaráðið. Av hesum haldi eg meg kunna staðfesta, at tað er ikki vegna drál, at frágreiðingin ikki varð endaliga góðkend fyrr enn 5. september 2023. Eg geri tí ikki meira við hetta klaguevnið, men avmarki mína viðgerð til at vera um vantandi innlit í eina átalu, grundarlagið fyri átaluni og upplýsingina av klagumálinum.

Tann 29. juni 2023 sendi KVF Heilsumálaráðnum soljóðandi innlitsumbøn:

> "Við hesum verður biðið um innlit í ta átalu, ið A fekk á fundi í Heilsumálaráðnum tann 16. juni í ár. Somuleiðis verður biðið um innlit um grundarlagið fyri hesi átalu."

Tann 4. juli 2023 svaraði Heilsumálaráðið KVF, at ongin átala varð givin á fundinum 16. juni 2023, at fundarfrásøgnin ikki var endaliga góðkend, og tí varð innlit ikki latið í málið.

Skjølini í málinum vísa, at ein átala varð givin til nevnda starvsfólkið. Átalan var tó ikki givin á fundinum 16. juni 2023, men á einum fundi í Heilsumálaráðnum nakrar dagar áðrenn.

Eisini vísa skjølini, at á fundinum 16. juni 2023 kunnaði landsstýriskvinnan um hetta starvsfólkamálið. Kunningin er ikki nevnd í frágreiðingini frá fundinum 16. juni 2023. Tann 3.

juli 2023 sendi ein av fundarluttakarunum Heilsumálaráðnum ískoyti til frágreiðingina um nevndu viðurskifti. Heilsumálaráðið avgjørdi, at ískoytið ikki hoyrdi heima í frágreiðingini frá fundinum 16. juni 2023, men at hetta skuldi skrásetast í tað viðkomandi starvsfólkamálið.

Innlitslógin og mál um starvsfólk
Endamálið við innlitslógini (lóg nr. 133 um innlit í fyrisitingina) var at styrkja um gjøgnumskygni og opinleika hjá myndugleikum, sum viðgera og taka avgerðir, sum ávirka fólk, feløg og samfelagið sum heild.

Innlitslógin skal tryggja borgarum og fjølmiðlum møguleika at fylgja við í, hvat hendir í almennu umsitingini, viðvirka til at skapa áhuga fyri almennum viðurskiftum, og opinleikin skal vera við til at økja álitið á almennu umsitingina.

Lógin hevur serligan týdning fyri fjølmiðlarnar, tí hon gevur teimum møguleika at fylgja við í og halda eyga við, at alt fer rætt fram. Harumframt gevur hon fjølmiðlunum møguleika at viðgera og kunna fólk á røttum faktiskum grundarlagi.

Útgangsstøðið sambært innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl hjá almennum myndugleikum, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit.

Innlitslógin er eisini galdandi fyri mál um starvsfólk hjá tí almenna, tó við tí avmarking jbr. § 2 stk. 1, at fyri mál um starvssetan og flytan í hægri starv er bert § 6 um notatskylduna galdandi.

Ein umbøn um innlit í eitt starvsfólkamál skal viðgerast eftir vanligu reglunum í innlitslógini. Eg fari í hesum sambandi at vísa á § 4, stk. 1, sum er soljóðandi: ”§ 4. Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans. …”. Sum nevnt í ásetingini, so kunnu upplýsingar ella skjøl í starvsfólkamálum undantakast, men bert um §§ 7 – 14 í lógini heimila hesum.

Sambært § 4, stk. 3 í innlitslógini skal ein áheitan um innlit skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at fáa innlit í. Hetta fyri at tað skal vera gjørligt hjá myndugleikanum at eyðmerkja umbidnu skjølini.

At eyðmerkja málið / skjalið
Í hesum føri innihelt innlitsumbønin eina tilskilan til ein persón og eina ávaring, ið hesin skuldi hava fingið, men víst varð til skeivan fund. Hetta førdi tó, eftir mín meting, ikki til nakran iva um, hvat starvsfólkamál ella skjal KVF ynskti innlit í. Tað var tí gjørligt hjá Heilsumálaráðnum at eyðmerkja mál og skjal út frá upplýsingunum frá KVF.

Var innlitsumbønin ógreið, átti Heilsumálaráðið, sambært § 7 stk. 1, í fyrisitingarlógini at vegleitt KVF soleiðis, at KVF kundi gjørt greiðari, hvat innlitsumbønin fevndi um, so tað

harvið gjørdist lættari hjá Heilsumálaráðnum at finna fram til ynsktu skjølini. Í hesum máli, var eftir míni meting, eingin ivi um, hvørja ávaring / starvsfólkamál talan var um, hóast KVF nevndi annan fund. Kravið um eyðmerking í § 4 stk. 3 var tí eftir míni meting uppfylt. Heilsumálaráðið kundi tí av røttum ikki koma sær undan at veita innlit við at svara, at eingin ávaring varð givin á fundinum 16. juni 2023. Hetta er greitt ein skeiv avgreiðsla av innlitsumbønini.

Tað er í hesum føri ikki viðkomandi fyri innlitið í ávaringina, at frágreiðingin frá fundinum 16. juni 2023 ikki var endaliga góðkend. Ávaringin varð longu endalig og skrásett í starvsfólkamálinum hjá viðkomandi, áðrenn Heilsumálaráðið noktaði innlit 4. juli 2023. Viðmerkjast kann, at eisini umrødda ískoytið frá einum av luttakarunum um kunningina um starvsfólkamálið á fundinum 16. juni 2023 var Heilsumálaráðnum í hendi og skrásett, áðrenn Heilsumálaráðið noktaði KVF innlit tann 4. juli 2023.

<u>Vantandi frágreiðing um kunningina á fundinum 16. juni 2023</u>
Í frágreiðing til mín, dagfest 8. november 2023, hevur Heilsumálaráðið víst á, at áðrenn menningarfundurin byrjaði, tann 16. juni 2023, ynskti landsstýriskvinnan at tosa við sjúkrahúsleiðsluna um samstarv og álit í sambandi við eitt starvsfólkamál, sum var avgreitt.

Heilsumálaráðið avgjørdi, at hendan kunning frá landsstýriskvinnuni ikki skuldi í frágreiðingina frá menningarfundinum 16. juni 2023, og at ískoytið um hesi viðurskifti, sum kom frá einum av luttakarunum, skuldi skrásetast í viðkomandi starvsfólkamál.

Heilsumálaráðið hevur greitt mær frá, at ráðið ikki hevur gjørt frágreiðing ella notat frá kunningini. Ráðið metti seg ikki hava skyldu til at gera notat frá kunningini, sambært § 6 í innlitslógini, tí talan var bara um kunning um eina avgerð, sum varð tikin og ikki um eina avgerð, sum fór at verða tikin.

Hóast kunningin ikki kemur undir notatskylduna í § 6 í innlitslógini, so kann tað undra, at frágreiðingin frá fundinum ikki nevnir kunningina um starvsfólkamálið t.d. undir einum evni um annað ella ymiskt, sum vanligt er at gera, tá talan er um viðurskifti, sum ikki standa á dagsskránni fyri ein fund. Eg haldi, at tað hevði verið góður fyrisitingarsiður, at kunningin varð nevnd í fundarfrágreiðingini. Eg haldi, at tá Heilsumálaráðið avgjørdi ikki at taka málið við í frágreiðingina, var frágreiðingin avmarkað á slíkan hátt, at ivi kann setast við um frágreiðingin er eftirfarandi. Eisini kann hetta elva til ein illgruna um, at endamálið við avmarkingini var ein roynd at avmarka møguleikarnar fyri innliti.

<u>Upplýsing og samskifti í sambandi við klagumálið</u>
Sambært § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini hava myndugleikar skyldu at geva mær tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum eg embætis vegna krevji at fáa fyrilagt.

Eg havi í hesum máli í fleiri førum havt tørv á at spyrja umaftur og nærri um viðurskiftini í málinum fyri at fáa málið nøktandi upplýst. Eftir míni meting skyldast hetta, at Heilsumálaráðið í byrjanini av málinum valdi at lata mær avmarkaðar frágreiðingar um málið at nokta KVF innlit. Í frágreiðingunum frá ráðnum tann 21. og 28. september 2023 og 23. oktober 2023 upplýsti Heilsumálaráðið ikki, at ráðið hevði givið viðkomandi starvsfólki eina ávaring, men á einum fundi nakrar dagar frammanundan. Ei heldur upplýsti ráðið, at kunnað varð um hetta málið á fundinum 16. juni 2023. Eitt skjal sum fylgdi við frágreiðingini frá 23. oktober 2023 gav mær eina ábending um nevndu viðurskifti. Eftir at eg tann 30. oktober 2023 aftur spurdi nærri um málið, greiddi Heilsumálaráðið í skrivi tann 8. november 2023 veruliga frá málinum um eina átalu, og hvør samanhangurin var millum hetta starvsfólkamálið og menningarfundin 16. juni 2023.

## Samanumtikið

Eg haldi samanumtikið, at innlitsumbønin var skeivt viðgjørd, tá Heilsumálaráðið, hóast innlitsumbønin greitt tilskilaði ávísa ávaring til navngivið starvsfólk, noktaði innlit, vísandi til at eingin ávaring varð givin á fundinum 16. juni 2023.

Eg haldi eisini, at tríggjar tær fyrstu frágreiðingarnar frá Heilsumálaráðnum til mín vóru so mikið avmarkaðar, at tær kunnu tulkast sum vantandi vilji at upplýsa klagumálið nøktandi yvirfyri umboðsmanninum.

Eg haldi, at framferðin hjá Heilsumálaráðnum í hesum máli er ikki í samsvari við endamálið við innlitslógini um at virka fyri gjøgnumskygni og opinleika í umsitingini. Eg fari tí at geva Heilsumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum máli og fari samsvarandi umboðsmanslógini § 10 at senda fráboðan um málið til Løgtingið, løgmann og landsstýriskvinnuna í heilsumálum.

Eg fari samstundis at biðja Heilsumálaráðið taka málið upp til nýggja viðgerð og lata meg frætta hvat víðari hendir við málinum.

Vinarliga

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður